TING-HELLAN

# Dagstovnar ella høsnagarðar – eitt kommunalt øki í valdysti?

TINGHELLUANALYSA
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*



Børnini eru framtíðin. Hesari útsøgn ivast fáur í, serliga í hesum valtíðum. Men umstøðurnar, viðurskiftini og treytirnar hjá børnum broytast alsamt. Tað er ein náttúrligur partur av samfelagsmenning og broyting. Hjá okkum hevur broytingin havt við sær, at flest øll børn verða ansaði á stovni frá tí tey eru smá, ella rættari frá tí tey sleppa á stovn, til tey klára seg sjálvan. Roknast má við, at flestu kommunur stíla eftir at hava frítíðarskúla, ið hvussu so er trimum teim ynsktu flokkunum. At børnini mugu á stovn at verða ansaði, er ein neyðug avleiðing av at bæði kona og maður mugu arbeiða fyri at svara hvørjum sítt. Hetta er ein náttúrlig avleiðing av javnstøðu, soleiðis at kvinnan nú eisini arbeiðir úti og ger karrieru. Men hvat við børnunum?

### Kunnu børn læra?

Fyrr gingu tey og mólu í grannalagnum, vóru við í gerandisdegnum og fingu førleikar á tann hátt. Í dag má hesin lærdómur í størri mun koma á ansingarstovninum, tí smærru børnini eru ikki so nógvar tímar vakin við hús. Eg eri ikki av teimum, sum mæla til at ansingarstovnar og skúli skulu hava uppalingarábyrgdina frá foreldrunum. Eg haldi, at um vit vilja hava eitt samfelag har bæði maður og kona eru á arbeiðsmarknaðinum meðan tey hava børn, má dagstovnaøki neyðturviligani mennast.

Í dag verður dagstovnaøki raðfest niðarlaga. Politiski áhugin tykist einans at vera at arbeiða við bíðilista og syskinaavslátri, tí hetta loysir áleikandi tørvin og gevur møguligar atkvøður.

Avleiðingin er at vit hava børn frá 3 til 7 ár gangandi í barnagarði, uttan at tað eru nøkur krøv til teirra førleikar. Skal dagstovnurin sjálvur taka sær av hesum, krevur tað nógv størri fíggjarligt rásarúm og eina raðfesting av at hava útbúgvin starvsfólk á dagstovnunum. Tað er synd, at vit í dagsins samfelag velja ein leist sum sigur, at børnini ikki skulu læra fyrrenn tey eru 7 ár. Hugsað verður ikki um, at tey skulu sita á skúlabonki í barnagørðum. Tann lærdómur tey fyrr fingu av at ganga uppií heima við hús, hjá ommum og abbum og annars í nærsamfelagnum, má onkursvegna koma inn í dagstovnin. Annars standa vit í tí støðu, at børnini læra minni í dag enn fyri 30 árum síðan. Tí krevst, at kommunurnar ikki bert hugsa innstikaðar høsnargarðar fyri at ansa børnunum kvantitativt, tí foreldrini eru til arbeiðis, fyri at leggja eini 20 % av inntøkuni í kommunukassan. Her eigur so sanniliga eisini at verða hugsað um at menna børnini.

Tað hevur áður verðið víst á, at nógv børn í Føroyum hava atferðartrupulleikar. Møguliga kundi tað hjálpt, um fokus varð sett á atferð longu í barnagarðinum, so børnini longu fáa hjálp har. Hetta hevði somuleiðis spart pening í longdini, tí trupulleikarnir verða loystir, áðrenn teir gerast ov stórir.

### Foreldur mugu krevja?

Broytingar krevja, at vit sum foreldur vilja vera foreldur. At vit hugsa minni um frælsið at vilja hava frí frá børnunum, at foreldrini krevja meiri enn bara ansingartrygd, t.v.s. trygd fyri at barnið sleppur á stovn í morgin, um neyðugt. At brúkararnir eisini krevja av sínum kommunalu politikkarum, at dygdin skal betrast. Sum ein vinmaður segði, "skal bilurin á verkstað, finna vit eitt gott verkstað. Skal barnið á stovn, verða eingi krøv sett".

Metingin er ikki , at vit ikki hava gott fólk á okkara dagstovnum, tí tað hava vit og einans tí gongur tað ikki verri enn tað ger.. Men øki er raðfest ógvuliga aftarliga politiskt, og foreldur og harvið veljarar seta ov fá krøv til leist til politisku skipanina. Tað er ein sannroynd, at tað trupult av fáa lærda arbeiðsmegi til barnagarðar og bara tað, í sjálvum sær, átti at fingið ávaringarklokkuna at ljóða.

Nógv hevur verið tosað um kommunusamanleggingar og at leggja ábyrgdarøkir til kommunurnar. Barnaansing er eitt sosialt øki, sum kommunurnar hava ábyrgdina av, og ikki ber til at siga at tað er nóg væl røkt.

Røddir eru eisini frammi um heldur at varðveita kommunalu støddirnar og so tillaga skipanina so hon egnar seg betur til støddirnar, og at tær smærru kommunurnar keypa tænastur frá teim størru.

### Støðuloysi

Í nógvum londum byrja børn í einum slagi av skúla áðrenn tey eru 6-7 ár. Danska skipanin, sum vit í stóran mun hava kopierað, hevur frá tí vit tóku við, fingið fastan forskúla og í stóran mun lagt niður vanliga 10. flokk. Her hava vit, sum støðan er í fleiri ríkismálum, valt ikki at seta nýggjari danskar lógir í gildi, og samstundist valt heldur ikki at ment okkum ein annan veg, men bara standa í stað, í okkara serføroyska støðuloysi. Men heimurin mennist og broytist, eisini fyri børn! Fyri at taka Danmark sum dømi, er nú avgjørt, at børnini skulu hava ein ávísan førleika tá tey fara úr barnagarðinum sum 5-6 ára gomul. Hetta skal m.a. tryggja at børnini er klár at byrja í skúla, umframt at vera ein staðfesting av at børnini partvíst mugu lærast og uppdragast uttan fyri heimið í samfelagsskipanum sum okkara.

Tá vit hava eitt samfelag, sum krevur at bæði maður og kona arbeiða, er neyðugt at børnini verða ansaði. Men bert ansingartrygd innanfyri eitt stik, uttan at geva starvsfólkunum veruligan møguleika at arbeiða langskykt við børnunum, er ikki einum vælferðarsamfelag virðiligt.

### Eldraøki

Sami trupulleikin sæst í eldrarøktini, sum er sera krevjandi. Men aftur her hava vit valt at hava eitt samfelag, at børnini ikki hava stóran møguleika at taka sær av foreldrunum tá tey gerast gomul. Hetta pliktar. Tey gomlu skulu heldur ikki bert sita í einum høsnagarði. Ein broyting krevur raðfesting og krøv hvussu játtanin til øki verður brúkt.

Kvantitetur ella nøgd er ikki nóg mikið, vit skulu eisini hava dygd.

Við teim krøvum bara hesi bæði økini seta, má spyrjast um okkara kommunali bygnaður er nøktandi, um framtíðarætlanirnar eru nøktandi ella um hugsast skal av nýggjum. Skal landið t.d. taka sær av slíkum uppgávum, ella skulu kommunurnar gera tað í felag, við at tær smærru keypa tænastur frá teim størru kommununum. Men kommunurnar, kommunupolitikararnir og borgararnir mugu koma við samanhangandi krøvum, uppskotum og vilja til broyting. Tað er uppá tíðina at vit á hesum økjum flyta Føroyar inn í ein føroyskan leist gjørdan til føroyskan tørv og viðurskifti.

### Tosa við heimin!

Ein dagin tá eg var og vitjaði ommu mína á einum eldraheimi, sat ein onnur eldri kona undir liðini á mær og tosaði út í tóman heim, men við nógv fólk úr fortíðini. Ein spurdi hana; " hvønn tosar tú við?

– "Allan heimin, eg tosi við allan heimin, er tað ikki púra ørt?". So flenti hon og øll kaffistovan í kíki, meðan hon helt áfram at tosa við allan heimin. Henda lítla hendingin fekk meg at hugsað um hvussu umráðandi tað er, at vit viðhvørt minnast til at tosa við allan heimin og menna okkum, sjálvt um tað kann kennast eitt sindur ørt.





Formaðurin í Pedagogfelagnum:

# Nøgd og dygd samsvara ikki á dagstovnum

TING-HELLAN

Kvaliteturin á ansingini á dagstovnum er ikki tryggjaður sum er. Hetta kann fáa álvarsligar fylgjur fyri børn við serligum tørvi, sigur formaðurin í Føroya Pedagogfelag

ANSING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Formaðurin í Føroya Pedagogfelag er púra samdur við orðingunum í analysuni í Tinghelluni hesuferð um, at kvalitetur og kvantitetur ikki fylgjast nóg væl á ansingarøkinum.

– Tú hevur ikki tryggjað kvalitetin í løtuni. Fleiri stovnar verða latnir upp, men í sama viðfangi verða ikki fleiri pedagogar tiknir inn á pedagogskúlan, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Hann er fakfelagsformaður fyri fleiri enn trimum prosentum av Føroya fólki, tá ið Føroya Pedagogfelag hevur góðar 1.500 limir. Harav starvast eini 900 teirri á dagstovnum. Einki veruligt arbeiðsloysi er millum hansara limir, men kortini er formaðurin ikki nøgdur við støðuna.

– Tað er øgiliga trupult hjá stovnum at fáa nóg mikið av pedagogum. Tað er av teirri einføldu orsøk, at tað ikki eru nóg nógvir pedagogar, sigur Jarvin Feilberg Hansen, sum hevur verið formaður í Føroya Pedagogfelag síðani 1. mars í ár.

Støðan á fleiri stovnum er tann, at bert leiðarin á stovninum er námsfrøðingur, og restin av starvsfólkunum eru óútbúgvin starvsfólk, oftani ung fólk, sum arbeiða í styttri tíðarskeið á dagstovni.

### Saknar kjak um innihald

Seinastu fýra árini eru eitt munandi stórt tal av dagstovnum kring landið latnir upp. Ikki minst í Tórshavnar kommunu, har tólv nýggir ansingarstovnar hava latið upp seinastu fýra árini, har sitandi býráð setti sær sum mál at nøkta ansingartørvin.

Men formaðurin í Pedagogfelagnum saknar í stóran mun eitt kjak um innihaldið í ansingini - heldur enn bert at nøkta tørvin.

– Støðan er væl vorðin betri tey seinnu árini, men tað kundi verið so nógv betri enn, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Barnaansingarøkið var tað fyrsta, sum varð lagt út til kommunurnar at umsita.

– Tá økið varð lagt út, tá fylgdi ein dagstovnalóg við. Hon ásetti, at tveir triðingar av starvsfólkunum á dagstovnum skuldu vera pedagogar, men hetta er langt frá støðan í dag. Tískil haldi eg ikki, at karmarnir samsvara við lógina, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Ein kanning, sum Pedagogfelagið gjørdi fyri einum ári síðani, vísir, at tað tá restaði 160 pedagogar í fyri at náða ásetingini í dagstovnalógini um at hava tveir triðingar pedagogar á stovnunum. Og tørvurin verður mettur at vera nógv voksin seinasti árið.

– Vit hava tosað við landsstýrismanin um trupulleikan, men tað er sum at sláa í eina dýnu, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

– Tú kanst ímynda tær, um støðan var tann sama í fólkaskúlanum. Vit halda ikki, at landið hevur ráð at lata vera við at útbúgva fleiri pedagogar, sigur Jarvin Feilberg Hansen.



*Jarvin Feilberg Hansen heldur, at tað kunnu vera børn við serligum tørvi, ið fara at kenna fylgjurnar av vantandi útbúgnu arbeiðsmegini á dagstovnum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tann nýggja dagstovnalógin, sum bert er nøkur fá ára gomul, hevur sett amsing á dagskránna, og tað fegnast formaðurin í Pedagogfelagnum um. Hann heldur, at dagstovnalógin inniheldur nógv gott, men tað gongur heldur striltið at fylgja orðingunum í lógini.

### Atferðar trupulleikar

Formaðurin í Pedagogfelagnum vísir á, at tað er ikki bara fyri einki, at saknur er á pedagogum á dagstovnum.

– Uppgávurnar hjá pedagogum í dag eru so krevjandi og stórar, at tað krevur útbúgvin fólk, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Eitt økið, har pedagogar serliga kunna vera hentar, er í sambandi við børn við atferðar trupulleikin ella við serligum tørvi.

– Pedagogar eru sera hentir til seruppgávur. Tað snýr seg um at síggja og fanga børn við serligum tørvi so tíðliga sum gjørligt. Annars kann tað vera til óbøtaligan skaða, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Tá nýggir stovnar verða latnir upp, so spæla pedagogarnir ein ógvuliga lítlan leiklut í uppbyggjandi arbeiðinum, og tað heldur Jarvin Feilberg Hansen vera átaluvert.

– Støðan í løtuni er ikki í lagi. Tað eru ov lítið av útbúgnum pedagogum á stovnunum, og tað tryggjar ikki kvalitetin, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

### Størri samstarv við skúlar

Á frítíðarskúlunum kring landið, starvast nógvir pedagogar. Har verður eisini miðað ímóti at hava tveir triðingar av útbúgnar pedagogar. Sjálvur er Jarvin Feilberg Hansen ikki so glaður fyri heitið Frítíðarskúli, tá hesin skúli ikki hevur nakað at gera við sjálvan fólkaskúlan sum so.

Formaðurin í Pedagogfelagnum heldur so avgjørt, at eitt tættari samstarv og øðrvísi skipað yvirgongd millum dagstovn og skúli hevði verið heppin.

– Vit hava saknað, at tað verður sett størri fokus á hatta økið. Tað er eisini nakað, vit hava roynt at tosað við Lærarafelagið um, og tað vildi verið upplagt at arbeitt víðari við hesum, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

### Útbúgving

Tað er ikki vantandi áhugi, sum ger, at tað resta fleiri enn 160 pedagogar á dagstovnum kring landið.

Pedagogskúlin fær eini 150 umsóknir um árið, men tað eru bert tey 24, sum sleppa inn. Formaðurin í pedagogfelagnum sigur seg vita, at nógv leita sær tí heldur til Danmarkar, og tey síggjast ikki øll aftur á føroyskum stovnum.

Frá politiskari síðu verður tað avvíst at taka fleiri fólk inn á pedagogskúlan. Grundgeving er vantandi peningur.

Sjálv útbúgvingin stendur fyri broyting. Tað heldur formaðurin eisini vera neyðugt, tá ið uppgávurnar hjá pedagogum broytast nógv við broytingunum í samfelagnum. Vit fáa ikki formannin í Pedagogfelagnum at siga, um hann heldur útbúgvingina vera nóg góða sum, men hann sigur, at nógvir góðir pedagogar koma út á marknaðinum í løtuni, og trupulleikin er serliga vantandi politiskur vilji at taka fleiri nemingar inn á skúlan.

## VIÐMERKINGAR

# Bústaðartrupuleikin í Havnini

**Charlotta á Váli Olsen**
*Valevni fyri Miðflokkin í Suðurstreymi*

Sum øllum kunnugt er stórur trupuleiki at fáa tak yvir høvdið í Havnini. Ert tú heppin at fáa eina íbúð/hús, skalt tú gjalda tað hvíta úr eygunum fyri hana, líka mikið um tað er til leigu ella keyp. Hetta gera byggihávar og spekulantar sær dælt av. Enntá grundstykki frá kommununi kostar sum eini hálv hús aðra staðir.

Hvussu skulu tey ungu, sum ætla at seta føtur undir egið borð klára at koma upp undan? Fyri tað fysta mugu minst 2 vanligar inntøkur til, helst eyka arbeiði. Hava tey so børn, mugu tey vera ansaði og kostar tað eisini. Alt í alt verður dagligdagurin hjá hesi familju so tungur, at tað bert verður orka til arbeiði og tað neyðugasta í heiminum. Ongin orka til hvønn annan og børnini. Hetta hevur so nógvar syrgiligar fylgjur, at vit áttu at følt okkum skyldugan til at gera nakað við henda trupuleika meðan nakað enn stendur til at bjarga.

Fyri tað fyrsta átti grundstykkjaprísurin ikki at verið so nógv hægri enn í øðrum kommunum. Harnæst skuldi húsalánsgrunnurin ella líknandi stovnur fari og kanna hvørja íbúð og hvørt hús, sum verður bygt ella er



VAL04

til sølu og virðismett tað, og so átti ikki at verið farið stórt út um tann prísin. Soleiðis kundu vit hildið húsaprísunum á einum fólkaligum støði.

Hetta hevði gjørt trivnaðin fyri familjurnar í kommunu okkara nógv betri!